# FØÐINGAR

15. sept. fingu Arndis Sunadóttir Rasmussen og Morten Wolff, Keypmannahavn ein son. Hann var 57 cm. og vigaði 4240 gr.

17. sept. fingu Ruth og Sigtór Heinesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3335 gr.

17. sept. fingu Eyðbjørg Hansen og Bjørn Magnusson, Haraldssund, ein son. Hann var 53 cm.og vigaði 3600 gr.

18. sept. fingu Monrudee og Flóvin H. Petersen, (Vangrangnoi/Vestmanna) ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3500 gr.

19. sept. fingu Sigrid Simonsen og Ólavur Ellefsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 3925 gr.

19. sept. fingu Vilbjørg og Eyðfinn, Eiði, ein son. Hann var 51 cm. og vigaði 2885 gr.

20. sept. fingu Krista og Olaf Davidsen, Æðuvík, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 4140 gr.

20. sept. fingu Ansa og Tommy Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4070 gr.

20. sept. fingu Jenny og John Kruse, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3790 gr.

21. sept. fingu Halgerð og Snorri Jøkladal, Fuglafjørður, ein son. Hann var 46 cm. og vigaði 2550 gr.

21. sept. fingu Maria og Olfrid Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3800 gr.

23. sept. fingu Eyð Joensen og Dennis Hansen, Viðareiði, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 3980 gr.

24. sept. fingu Johild og Bent Rasmussen, Syðrugøta, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4010 gr.

25. sept. fingu Connie Samuelsen og Jógvan Magnussen, Tjørnuvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3400 gr.

26. sept. fingu Mary-Ann Thomsen og Bergur Sørensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 4050 gr.

# ANDLÁT

**17. september**
Kristina Skydsgaard, fødd Hansen ættað av Ryggi í Miðvági, 90 ár

**19. september**
Øssur Djurhuus, Hvítanes, 58 ár

**21. september**
Karin Madsen í Bartalstovu í Syðrugøtu, 75 ár
Friálvur Joensen, Streymnesi, ættaður úr Vági, 60 ár
Jens Henry Ludvig, Hvalba, nevndur Jenus, 84 ár

**22. september**
Niels Dahl í Funningi, 81 ár

# LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 28. sept.: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnudagin 29. sept.: Magnus á Stongum, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

# TILTØK

**Gudstænastur leygardagin 28. sept.**
*Fríðrikskirkjan* kl. 20, Ungdómsgudstænasta, Martin R. Jacobsen

**18. sunnud. e. Trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Erland Beder
*Nólsoy:* kl. 12, Henning Nielsen
*Vestmanna:* kl. 11, Povl Bendix Knudsen
*Miðvágur:* kl. 11, kirkjan fyllir 50 ár, Vágakóri syngur, Hans Jacob Joensen biskupur og David Johannesen. Kl. 15 Barnagudstænasta, barnakór syngur, Inga Poulsen Dam
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Viðareiði:* kl. 14, barna- og familjugudstænasta, Elsa Funding. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
*Æðuvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Haldórsvík:* kl. 11, Marjun Bæk
*Selatrað:* kl. 11, Heri Joensen
*Skálafirði:* kl. 11,
*Oyndarfirði:* kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
*Húsavík:* kl. 12, altarg., nýggjur messuakul verður tikin í nýtslu, Bjarni Bæk, dómpróstur, og Jákup R. Hansen
*Øravík:* kl. 11, konfirmatión, Jónsvein Bech
*Hov:* kl. 11, Marianne Telling

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Vincenzo Brocanelli í Mariukirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag hava skótarnir loppumarknað fyri »Skótahjálpina«.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 18.00 Familjumøti (sjónvarpsupptøka). Offur til svøltandi í Afrika.
Mánadag kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúlin, kl. 18.00 Møti við Anniku við Skipá.

**Ebenezer**
Leygardagin kl. 16.00 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Familjumøti, kl. 21.00 Útimøti.
Mikukvølidð kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v. Sørin Steinhólm.
Mánakvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti og kl. 20.00 venur Manskórið.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Dánjal á Dul Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti, Richard Schwartson talar.
Heimasíða www.hebron.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 19-19.45 Bíbliutímin, kl. 19.45-20.15 Kaffisteðgur, kl. 20.15-21.00 Bønartímin.
Fríggjakvøldið kl. 18.00 ATAP Kids (Barnaklubbur).
Leygarkvøldið kl. 20.00 Missiónsmøti við Harald Mydland, Sarons Dal, Noreg.

Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti og sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin 29. sept. er ongin fundur vegna sjúku.
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman. Skráin er broytt. Jógvan Petersen og Absalon Matras siga frá um ferðir teirra í Rumenia.
Týsdagin 1. okt. kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

**Glæman, Kvívík**
Sunnudagin kl. 19.00 verður møti í Glæmuni við vestmenningum o.ø., sangbólkurin Gittit syngur.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti. Telefonandaktin 424471.

**Zion, Kollafjørður**
Ungdómsmøti verður í Zion leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið 1. okt. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Keldan, Skálafirði**
Hóskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20.00 Møti í Ítróttarhøllini í Runavík við bróðir Yun frá Kina.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Ann Randi, Djóna og Sigrun. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Sunnumorgin kl. 10.30 Møti við Harald Mydland frá Sarons Dal.
Mánakvøldið kl. 20.00 Ungdómsbólkurin møtir.

**Filadelfia, Gøta**
Sunnudagin 29. sept. verða møtini broytt soleiðis: Kl. 11.00 Familjumøti, kl. 12.00 Máltíð, kl. 12.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20.00, Oggi luttekur. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Á fundinum sunnukvøldið kl. 18.00 talar Jan Zachariassen úr Gøtu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM-skótarnir í Leirvík**
Í samband við skótahjálpina, skipar skótaliðið hjá KFUM-skótunum í Leirvík fyri Kafékvøldi í skótahúsinum leygardagin millum kl. 17 og 23, vaflir og kaffi verður selt og innkomni peningurin fer til skótahjálpina.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarbólkur (ung) hjá Hannu Poulsen, kl. 20.30 Bønarbólkur (menn) hjá Pól Thomsen.
Mikukvøldið kl. 20.00 Møti v/ Harald Midland.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Familjumøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Alphaskeið/ Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 28. sept. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Møti við suðuroyingum, sum at koma at tala og syngja.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18.00 Møti við suðuroyingum, sum tala og syngja. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Sanniliga, menniskjan er gras. Grasið visnar, blóman følnar, men orð Harrans stendur allar ævir«.*

*Jes. 40,7-8*

Mong av okkum eru upplærd við at leggja lív okkara í Harrans hendur. Og hóast alt er forgongiligt, har grasið visnar, og blóman følnar, stendur eitt eftir, og tað eru orð Harrans, ið standa til ævigar tíðir.

Guð hevur skapað okkum í síni mynd. Vit eru hansara dýrabæri skattur. Ja, hann elskar okkum so høgt, at hann sendir sín elskaða son niður til okkum, fyri at bjarga okkum.

Hetta lýsir Fr. Petersen væl í sálminum »Tíðin rennur sum streymur í á«. Í einum ørindi sigur hann: »Allir teir eru á sama hátt, staddir sum eg í vanda«. Hetta vísir lívið. Og tá dagar okkara eru taldir, ber hvør dagur ímóti fossinum, deyðanum. Men samstundis nýtir sálmaskaldið møguleikan at vitna, at ein er, ið er mentur at hjálpa okkum, ikki bert í tíðini, men eisini handan hav. Tað er Jesus, ið førir okkara bát, við himnastrondini og himnasandinum fyri framman.

Vit liva í einum forgongiligum heimi, har alt mangan tykist meiningsleyst. Men ein meining er, tí Harrin hevur lagt ævinleikan niður í hvørt mannahjarta. Og líta vit á hann, kunnu vit trygt leggja okkum at sova. Í kristusi er hin einstaki ongantíð einsamallur umborð, óansæð um illveðrið leikar í og skaddan hongur tjúkk oman yvir okkum. Tí áðrenn vit leggja frá landi fáa vit ta aldargomlu heilsanina við okkum frá ommun og abbum, foreldrum og vinum: »Jesus fylgi tær«!

Hesa heilsan geva vit teimum, ið farin eru undan okkum. Tey eru farin, vit standa fyri tørni.

Amen

**Andreas Andreasen**



# TILTØK

**Betania, Skopun**
Kl. 11.00 møta børn (3) 4. fl., kl. 14.00 møta børn 2.-3. fl., kl. 17.00 mnøta børn 4.-6. fl.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00.
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna konfirmatión.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Jónsvein og Heidi Bech. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur, Talari: Áki Andreasen, kl. 21.00 Útifundur, um viðrar.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Semtembermøti í Esbjerg**
Møti er í »Zions kirkens sognehus«, Nygaardsvej 103, Esbjerg. Eisini er møguleiki fyri at yvirnátta í Esbjerg, um tørvur er á tí.
Leygarkvøldið kl. 19.30 talar Jóannes Fonsdal, evni: Kristin í útisetri, Jón og Laila Poulsen syngja.
Sunnukvøldið kl. 19.30 talar Heri Eltør, evni: Kristin á heimleið. Heimligar kreftir syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Losjan í Havn**
Mánakvøldið 30. september kl. 20.00 verður minningarfundur.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 29. september verður gongutúrur av Sundi til Norðradals og gjøgnum líðina til Syðradals. Gingið verður um 4 tímar, lættur/miðal túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 30. sept.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 1. okt.:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 **Vit syngja.** Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Erling Poulsen sigur frá
*Mikudagin 2. okt.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Vitja Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu
*Hósdagin 3. okt.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 4. okt.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400..

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

# KONFIRMATIÓN

**Konfirmantar í Bønhúsinum í Øravík sunnudagin**
Petra Christiansen, Tvøroyri
Sólva Heidi Dimon, Trongosvágur
Joan Joensen, Tvøroyri
Leon Gunnar Johannesen, Tvøroyri

# BRÚDLEYP

Fríggjadagin 4. okt. kl. 17.00 giftast í Siloa í Fuglafirði Hanna Eliasen, Leirvík og Sigurð Ólason Vang, Tórshavn. Veitsla verður kl. 18.30 í Bygdarhúsinum íLeirvík fyri innboðin.

# SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 22. okt. hava hjúnini Fríðgerð og Helgi Mortensen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum 25. okt. kl. 19.00. Tey, ið vilja halda dagin saman við teimum, verða biðin um at siga frá á tlf. 315872 ella 267312 áðrenn 10. okt.

Týsdagin 1. oktober hava hjúnini Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi á Nesi silvurbrúdleyp. Opið hús verður á Svangaskarði frá kl. 15.00.

# 70 ÁR

Í dag verður Helga Øregaard, Søldarfjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum í kvøld kl. 19.00.

# 75 ÁR

Sunnudagin 29. sept. verður Anna Katrina í Skálanum, Klaksvík, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 28. sept. í kjallaranum í Betesda frá kl. 18.00.

